# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eitt valdømi = landsplanlegging

Sosialurin kunnger í dag veljarakanning, ið vísir, at stórur meiriluti er fyri gera Føroyar til eitt valdømi. Meiriluti er eisini fyri hesum á tingi.

Funnist verður at tingformanninum fyri at leggja slíkt uppskot fram. Tað átti at verið betri viðgjørt og ikki skundað ígjøgnum beint uppundir eitt val. Tingformaðurin vísir tí aftur og sigur, at tað fær ta viðgerð slíkt mál skal hava. Hann vísir á, at tá neyvan nakar flokkur fer at leggja tað fram, kennir hann tað sum sín rætt og sína skylda vegna alt løgtingið at gera tað.

Vit skulu ikki taka dagar ímillum, hvør hevur rætt og ikki, men vit staðfesta, at meiriluti er fyri at gera Føroyar til eitt valdømi millum tingmenn og í fólkinum. Tí er eingin orsøk til at bíða. Verður bíðað kann henda, at tað verður ongantíð lagt fram, at eitt nýtt ting fer at súlta tað, at ein nýggjur formaður ikki fer at síggja tað sum sína uppgávu osfr. Hví bíða, tá meiriluti er fyri hesum!

Avgerandi spurningurin er, um nýggj valskipan fer at styrkja høvuðsstaðarøkið og gera útjaðaran veikari. Vit halda, at nýggja skipanin fer at gagna demokratiinum og vera grundarlag undir bæði sunnari og tryggari politiskum og samfelagsligum viðurskiftum her á landi. Uppgávan hjá politikarunum verður tá tann sama fyri allar: líka mikið hvar í landinum teir búgva og virka, so er alt landið teirra ábyrgdarøki. Kjarnin í málinum er, at nú kunnu føroyingar fyri fyrstu ferð av álvara tosa um og arbeiða við landsplanlegging, har vit tilrættaleggja framtíðar íløgur og útbyggingar eftir hvat tænir øllum samfelagnum best og ikki bert einum lokalum øki. At vit tá sleppa undan dupultfunktiónum og harvið spill av ressursum og íløgum. Øll minnast vit 17 mannasamgongurnar, hvussu tann eini tingmaðurin megnaði at halda allar Føroyar í einum hvørkrataki. Við einum valdømi umboðar 17. maðurin ikki bert sína heimbygd, hann umboðar tá alt landið og kann harvið ikki "misbrúka" sín sess til bert at tæna sær og sínum.

Eitt valdømi setir eisini nýggj og strong krøv til tingfólk, hvar tey enn búgva. At tey lyfta seg upp á eitt professionelt støði og seta sær størri krøv. Býr tú t.d. í Havn og er valdur á ting krevur tað, at tú kennir alt landið og ikki bert tín heimsstað. Eitt valdømi krevur av politikarunum, at teir bæði hugsa landspolitiskt og lokalpolitiskt um somu tíð. Infrakervið er so nógv útbygt og samskiftið somuleiðis, at tað ber til at vera landspolitikari og lokalpolitikari uttan mun til, hvar tú er stæddur. Landið er so lítið, at tað má og skal bera til at reka lands- og lokalpolitikk samtíðis. Hesi bæði mugu vera partur av somu søk. Tey mugu ganga upp í eina hægri eind. Tað fáa vit nú møguleika fyri við einum valdømi. Fortreytin er tó, at vit styrkja tær kommunalu eindirnar.

**Sosialurin**

## Høgni – Høgni

POUL MICHELSEN



Nú gerst tú tað aftur – fer eftir manninum. Fyrst var tað Fólkaflokkurin, sum skuldi hava eina breiðsíðu. Nú standi eg so fyri tørni.

Sum skilst á tær, so skrivar Poul bara greinina " Lívið kann eisini livast frameftir"

1. sum eina gamla valfinta
2. og fyri at vinna sær vælvild í egnum flokki

**Ikki eiti á skoðsmál**

Men eg meinti hvørt orð av tí, sum eg í míni grein skrivaði. Haldi at viðmerkingarnar hjá Høgna Hoydal ikki vóru einum floksformanni í einum Tjóðveldisflokki verdar.

Høgni! Talan var um at gera eina semju millum allar flokkar. Høgni kundi eina løtu gloymt seg sjálvan og tann "fullkomna" Tjóðveldisflokkin og hildið seg til einfalda uppskotið um at minka blokkin og givið eitt hóskandi svar til sjálvt málið. Men tað gjørdi Høgni ikki! Ístaðin hølvaði hann Fólkaflokkin av og dró allar ósemjur flokkanna millum fram. Fólk kunnu sjálvi lesa viðmerkingarnar, sum stóðu í Sosialinum í farnu viku.

Men eg skal fegin gera eina nýggja roynd at grundgeva fyri, hví vit í Fólkaflokkinum leggja fram uppskotið um eina búskaparsemju.

1. Tað tykist, sum grundarlag er fyri at fáa eina slíka semju millum allar flokkar.

2. Avtalan kann tí gerast áðrenn valið - og tá ikki verða ein partur av valstríðnum.

3. Semjan vil verða ein týðiligur boðskapur til allar avvarðandi partar í samfelagnum soleiðis, at hesir fáa rúma tíð at tillaga sítt virksemi eftir semjuni - eitt nú:

a. Almenna umsitingin
b. Privata virksemið
b. Fíggjarheimurin
c. Danskir myndugleikar v.m.

Semjan skal helst rúma øllum flokkum, og er tilboðið frá Fólkaflokkinum sett fram sum eitt uppskot, sum allir flokkar í prinsippinum eiga at kunna ganga við til. Sjálvsagt skulu samráðingar til fyri at finna fram til, hvussu stóran niðurskurð, og yvir hvussu nógv ár flokkarnir kunnu semjast um. Tað sum umráðandi er, er, at tillagingin til ein sjálvberandi búskap fær fullan stuðul.

Politisku útmeldingarnar í dag – í mun til fyrr – eru, at flest allir flokkar síggja, at "blokkstuðulin" úr Danmark oftari er til ampa enn til gagns fyri tann føroyska búskapin.

Loksins kann eg leggja aftrat, at um Høgni Hoydal heldur, at orðingar mínar vóru ov harðligar, so skal eg viðganga, at eg kundi brúkt mildari vendingar og tó rokkið sama endamálinum. Men tó skerst ikki burtur, at eingin haldgóð grundgeving er hjá Tjóðveldisflokkinum fyri ikki at vilja viðvirka til at uppskotið um eina búskaparsemju vinnur frama.

## Eitt valdømi – sjálvandi

SÁMAL PETUR Í GRUND
Søldarfjørður



Hósdagur 16. august kemur framhaldandi at vera ein søguligur dagur.

Í eitt tríatiáraskeið hevur heimurin minst dagin 16. august sum deyðsdagin hjá tónlistarliga stórtalentinum Elvis Presley.

Helst kemur dagurin at vera tað eisini í rúmari framtíð, men nú hava føroyingar fingið nakað meira hugaligt at minnast dagin fyri. Dagin tá løgtingsformaðurin Edmund Joensen legði fyri løgtingið mál um Føroyar sum eitt valdømi.

Sjálvandi eigur okkara land at vera skipað í einans valdømi, heilt ótrúligt at tað skal hava tikið so langa tíð at náa hartil.

Vit hava brúk fyri at, í løgtinginum verður førdur landspolitikkur.

Tú fær ikki landspolitikkarar burturúr eini lokalpolitiskari valskipan.

Valskipanin við fleiri valdømum hevur sín uppruna í eini tíð, hvar løgtingið var blandað upp í nærum hvørt smámál – heilt úti í útriðini av landinum.

Nú hvar mong av lokalmálunum eru latin út í lokalumráði at umsita, er eingin sum helst meining í at hava landið býtt upp í fleiri valdømi.

Harumframt skaðar tað framburðin fyri land okkara at vit ikki fyri langari tíð síðani hava skipað okkum í eitt valdømi.

Hví skulu politikararnir í miðstaðarøkinum, sum altíð vilja vera í fleirtali, sleppa undan at hava eina meining um og ábyrgd av útjaðaranum?

Við einum valdømi má hvør einasti valdi politikari vísa atlit til alt landið sum eina heild.

Hví skal Vágoyggin bara hava 2 umboð í løgtinginum? Hví ikki 31?

Er tað ikki betri fyri Vágoynna, at tað eru 31 tinglimir sum í síni støðutakan eru klárir yvir, at teirra avgerð kemur at telja persónligt til eitt komandi løgtingsval?

Skulu vit fáa politikarar sum vilja føra politik sum er øllum landinum til gagns, so mugu teir vita, at teir vera vigaðir av øllum fólkinum.

Eitt fólk – eitt land – eitt valdømi.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.